gult cyan magenta svart

Tusitala

SØGUR: R. L. Stevenson var› á oynni Samoa nevndur ' Tusitala', sum merkir hann, i› sigur søgur. Mánadagurin var 150 ára dagur hansara

Birgir Kruse

Robert Louis Stevenson varð borin í heim í Edinburgh hin 13. november 1850. Mánadagurin var sostatt 150 ára dagur hansara. Nú Fróðskaparsetur Føroya lýsir til kapping um hvørjar gamlar bøkur vóru í heimunum, havi eg leitað upp Nordisk Konversations Leksikon bind 8. Útgávan, sum er frá 1964, sigur um Stevenson, at hann fór undir at lesa løgfrøði, men gavst og fór at reika og skriva ferðafrásagnir og ritroyndir. Árið eftir at hann skrivaði "New Arabian Nights" í 1882, gjørdi hann rættuliga vart við seg, tá bókin "Treasure Island" kom út. Hon varð týdd til mong mál, eisini danskt og føroyskt.

Í hesari alfrøðini frá 1964 verður Stevenson lýstur í avgjørt positivum orðum og sagt verður, at hann við frægd skrivar seg inn í frásøgutraditiónina hjá Walter Scott. Og eingin hevur gjørt Stevenson tað eftir, staðfestir Harald W. Møller í Nordisk Konversationsleksikon.

Í bókarøðini hjá forlagnum Politiken, sum nevnist "Verdenslitteraturens hvem-skrev-hvad" (1969), sigur Peter P. Rohde um Stevenson og skaldskap hansara, at sami útferðarlongsul, sum dreiv Thomas Hardy, eisini dreiv Stevenson, sum leitaði til enda jarðarinnar at finna eina eydnuríkari tilveru. Hana fann hann millum innfødd á oynni Samoa. Men hann fann eisini syfilis, brennivín og eitt ótolandi harraveldi, sigur Rohde, sum heldur fram, at ferðin hjá Stevenson kveikti hann at skriva fleiri av skaldsøgunum, ið eru at meta sum einki annað enn eskapisma, tó kanska undantikið "Dr. Jekyll og Mr. Hyde" (1886), har tað eydnast rithøvundanum at fanga eitt sið- og sálarfrøðiligt fyribrigdi, nevniliga dupultu náttúru menniskjans sum bæði góða og ónda, í óvanliga einføldum líki. Hetta er metingin av Stevenson í 1969.

Í 1990 fer danin Ejgil Sjøholm undir ein bókmentunarligan álmanakka, sum forlagið Gyldendal gevur út á hvørjum árið, tí heitið "Gyldendals litteraturkalender". Hesin álmanakki fyri 2001 er júst komin á marknaðin. Í enn aktuella søgufróða kalendaranum (2000) fegnast Sjøholm um, at Stevenson á sinni ikki elti, sum faðirin hevði slóðað. Hann var verkfrøðingur, pápin. Í 1871 fekk ungi Stevenson silvurmerki fyri ritgerð um nýggj ljós til blunkandi vitar. Hóast hetta valdi hann pennin. Meðan pápin passaði vitar fyri The Board of Northern Lighthouses í Skotlandi, taldi barnagentan unga Roberti søgur. Hugurin at ferðast varð honum í holdi borin. So tá sjúka kom á hann, leitaði hann upp heitari lond. Dreymurin – og fepurin – førdi hann til Samoa.

Søgubókina, klassikaran, fyri børn í øllum aldri "Loynioynna" gav hann út í bók 1883. Tað var í Amerika, tá Stevenson giftist Mrs Fanny Osborne, at hann fyri soni hennara, lítla Lloyd, segði søguna um "Loynioynna". Høvuðspersónarnir í hesi søgu eru ógvuliga ólíkir, men møtast og hjálpast tá á stendur. Teir eru hin djarvi drongurin Jim og hin grummi sjórænarin Long John Silver.

Tað var í 1888 at Stevenson fór úr Bretlandi at søkja sær heilsbót, tí hann var so ringur av lungnasjúku. Hann støðgaði á oynni Samoa, har hann vællýddur fekk tilnavnið "Tusitala", ið merkir hann, ið sigur søgur. Her varð hann grivin tá hann brádliga doyði av heilablæðing í 1894.

Tað munnu verða fáir rithøvundar, sum hava fingið so nógv filmsfólk upp á føtur, sum Stevenson. Í alnótini kunnu vit á Internet Movie Database leita upp ikki færri enn 35 filmar, ið allir byggja á eina og somu søgu, nevniliga "Treasure Island" ella "Loynioyggin", sum fløyska týðingin ljóðaði í framhaldsøgu í Dagblaðnum 1948-49 og seinni, tað var í 1958-60, sum myndasøga í 26 pørtum í Glugganum. Tað var Knút Vang sum týddi framhaldssøguna í Dagblaðnum.

Í 1986 gjørdi danski sangarin Sebastian sangleik úr søguni um "Loynioynna". Leikurin, sum settur varð upp á Folketeatret, helt fast um danska heitið, sum hevur verið brúka alt síðani 1888 "Skatteøen".

Sambært Internet Movie Dababase verður arbeitt við at gera film "The suicide club" úr søgu Stevenson's, har leikur fer fram í London 1899. Leikarar í hesum filmi eru David Morrisey, Jonathan Pryce og Catherine Siggins.

RLS-klubbar eru víðahvar. RLS stendur fyri Robert Louis Stevenson. Nú 150 ára dagur Stevenson's varð hildin mánadagin, hevði RLS-klubbin í Edinburg savnað tilfar til eina minnisbók, sum Karen Steel hevur ritstjórnað. Skálað varð fyri "Tusitala" á Carlton Highland Hotel henda dagin og sjónleikararnir John Sheddon og Michael David lósu úr verkum Stevensons.



- Loynioyggin: Long John Silver og Jim í bretskum BBC-filmi frá 1977 - størra myndin, og Israel Hands í russiskum filmi frá 1971 - innsetta myndin



FRAMHALDSSØGA

Dr. JEKYLL og Mr. HYDE

eftir R. L. Stevenson

Umsett hevur Johannes av Skarði

Robert Louis Stevenson á føroyskum

"Loynioyggin" Knút Vang týddi, framhaldssøga í Dagblaðnum 1948-49
"Dr. Jekyll og Mr. Hyde" Jóhannes av Skarði týddi, Gluggin 1955-56 (nr.1-10)
"Loynioyggin" ónevndur týðari, myndasøga í Glugganum 1958-60, (26 partar)
"Fløskudevilin" Sverri Egholm týddi, Margretha Næss læs í Útvarpi Føroya 1965

ítróttur

Nr. 223 • leygardagur • 18. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Nu Stjørnan hevur fleiri stuðulsleikarar á skaðalistanum, er tað ivaleyst fløvandi hjá venjaranum, at Sólvá Eystberg aftur hevur fingið hug til fyrstudeildarhondbólt
Mynd: Álvur Haraldsen

Tjaldur-Stjørnan 10-28 (5-13)

Avgreiðslu-spurningur

Sum væntað hevði Stjørnan ongar trupulleikar av at basa kvinnuliðnum hjá Tjaldur

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað vóru toppur og botnur, sum hittust inni í Runavíkini hóskvøldið.

Hóast ferðingin hjá gestunum kanska kundi verið betri, so tóktist hetta á ongan hátt at nerva stjørnurnar, sum alla tíðina høvdu fult tamarhald á gongdini í dystinum.

Uttan at tríva nakað serligt í dystin sjálvan, so kann staðfestast, at Tjaldur heldur ikki fekk fyrstu stig felagsins í hesum dystinum.

Tað var nú heldur ikki væntandi, men hóast greiða tapið, so sýndu tær í løtum, at ein ávís framgongd nú er at hóma á liðnum. Ein framgongd, sum ikki á nakran hátt órógvaði Stjørnuna, men hinvegin kann væl verða, at tær í komandi dystunum fara at geva onkrum av lægri staddu liðunum dygga mótstøðu.

Vikuskiftið

Komandi dystin hava tær eisini møguleika fyri hesum, tá Sóljan kemur á vitjan í einum dysti, sum sær út til at vera avgerandi fyri, hvørt Tjaldur skal liggja einsamalt í botninum, ella um tað fer at eydnast teimum at fáa kontakt við hini liðini.

Vónir eru enn tá um fult hús í Runavík, tí umframt at kvinnurnar nú hóma fyrstu stigini, so fáa menninir eisini vitjan av H71. Fyrra dystin vann H71 so syngjandi, men kanska verður øðrvísi hesaferð.

Annars verða fleiri áhugaverdir dystir í báðum deildum hetta vikuskiftið. VB, sum higartil hevur haltað eitt sindur eftir í kvinnutoppinum, fer á vitjan hjá bæði VÍF (leygardagin) og Kyndli (sunnudagin). Einki er at ivast í, at hondbóltsáskoðarin betri er førur fyri at gera sær eina meting av VB styrkini hetta kappingarárið.

Seinasti dysturin hjá kvinnum hetta vikuskiftið verður í Klaksvík, har Neistin skal á vitjan.

Toppdystur í Vestmanna

Hjá monnunum eru tveir dystir, umframt áðurnevnda dyst í Runavík.

Í Havn kemur KÍF á vitjan hjá Kyndli, sum ivaleyst vil hevna seg inn á kollfirðingar fyri teirra part í ringu byrjanini hjá Kyndli.

Seinni dysturin sunnudagin verður í Vestmanna, har StÍF kemur á vitjan. Hóast VÍF má finna seg í at eiga favoritt-heitið undan dystinum, so er einki at ivast í, at tey í Vestmanna eru spent undan dystinum. Einasti dysturin, sum strandingar higartil hava tapt, var júst í Vestmanna, og spurningurin er so, um teir megna at vinna hetta aftur, ella um teir bert skulu lata VÍF renna undan øllum hinum.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
Tjaldur:
Beinta Joensen 2, Sunrid Gleðisheygg 2(1), Milica Ergic 2, Ann-Maria Østerø 2, Kristine Ellingsgaard 1, Thurid Lamhauge 1

Stjørnan:
Joan M. Joensen 7(1), Anna K. Samson 7, Vesna Tomajek 6, Bára Skaale 3, Vesna Radovic 2, Sólvá Eystberg 1, Una Olsen 1, Berlina Sólsker 1

Brotskøst:
Tjaldur 3, Stjørnan 1

Dómarar úr StÍF:
Alexandur Johansen og Jón Rasmussen. Høvdu eitt friðarligt kvøld

Støðan 1. Deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1. VÍF	8	7	-	1	-	0	241	124	117	15
2. Stjørnan	7	6	-	1	-	0	200	147	53	13
3. VB	5	3	-	0	-	2	145	102	43	6
4. Kyndil	5	3	-	0	-	2	123	130	-7	6
5. Neistin	7	2	-	0	-	5	138	171	-33	4
6. Sóljan	7	1	-	0	-	6	145	199	-54	2
7. Tjaldur	7	0	-	0	-	7	104	223	-119	0

Støðan 1. Deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1. VÍF	7	7	-	0	-	0	238	170	68	14
2. StÍF	7	5	-	1	-	1	212	168	44	11
3. Kyndil	6	2	-	2	-	2	167	154	13	6
4. H71	7	3	-	0	-	4	193	203	-10	6
5. Neistin	7	3	-	0	-	4	167	181	-14	6
6. KÍF	7	1	-	1	-	5	160	183	-23	3
7. Tjaldur	7	1	-	0	-	6	157	235	-78	2

Dystir um vikuskiftið

Flogbóltur

TÍÐINDASKRIV

Meistaradeild menn
Leygardagur
KÍ-høllin
Mjølnir-Fleyr, kl. 15.00
Sunnudagin
Eysturskúlin
Fram -ÍF, kl. 15.30

Sera áhugavert umfar er á skránni hjá monnunum. Úrslitini seinasta vikuskifi høvdu við sær, at Fram og Mjølnir eruájøvn í stigum, 8 stig í part. Men kappingin stendur ikki bara millum hesi bæði liðini. Fleyr er nú komið upp á 6 stig, og vinna teir í Klaksvík leygardagin, hava teir tikið oddaliðini aftur.

ÍF er í teirri støðu, at teir hava bara spælt tríggjar dystir. Teir taptu fyrsta dyst, men hava so vunnið teir báðar seinastu, og millum annað bankaðu teir Fleyr í Gundadalshøllini. Nýggi venjarin hevur broytt liðið, so Fram fær torføra uppgávu at loysa sunnudagin í Eysturskúlanum. Fram hevði ein ringan dag ímóti Fleyr í seinasta dysti, og teir mugu taka sær um reiggj, skulu teir fáa nakað burturúr dystinum ímóti ÍF.

Meistaradeild kvinnur
Leygardagur, 18. nov.
KÍ-høllin
Mjølnir-Fleyr, kl. 17.00
Leygardagur, 18. nov.
KÍ-høllin
Fossanes-Dráttur, kl. 13.00
Sunnudagur, 19. nov.
Trongisv.
TB-ÍF, kl. 13.00

Hjá kvinnunum hendi tað gleðiliga seinasta vikuskifti – fyri spenningin í hvussu er – at Dráttur vann á Mjølni. Tað hevur við sær, at kappingin í oddinum er púra jøvn. Hóast tapið er Mjølnir tó væl fyri til dystin ímóti Fleyr leygardagin í KÍ-høllini. Hjá Fleyr hevur gingið sera væl í seinastuni, og liðið hevur nú vunnið tríggjar dystir á rað. Klaksvíkskvinnurnar eru óhugnaliga sterkar á heimavølli, men Fleyr er tó tað liðið, sum oftast vinnur á Mjølni. Við verandi spæli er tað ikki ómøguligt, so klassikarin er áhugaverdari, enn hann hevur verið í nøkur ár.

Dráttur spælir eisini í KÍ-høllini leygardagin, men tann uppgávan skuldi verið løtt. Oddaliðið eigur ikki at fáa trupulleikar við Fossanesi.

Sunnudagin er so møguleiki hjá TB at fáa gongd á aftur. ÍF er mótstøðuliðið, og ilt er at siga hvør fer at vinna tann dystin. Bæði liðini hava spælt misjavnt higartil, tó hevur TB kanska leikliga havt munin, og á heimavøllin plagar at liggja væl fyri.

gult cyan magenta svart